## Hvussu leingi skal eg sita?

Tað er ynskiligt, at tú situr sum foreldraumboð í 2 ár fyri at fáa gott arbeiðslag. Fyri at skapa framhaldni í arbeiðnum er skilagott, at eitt av verandi umboðum heldur fram. Árið eftir stendur viðkomandi umboð fyri vali.

.

## Grundreglur fyri góðum samstarvi

- Tú hevur gott samband við flokslæraran
- Tú ert við á fundum í foreldráðnum
- Tú ert við at skipa fyri tiltøkum av ymiskum slag
- Tú gert ikki alt sjálv/ur
- Tú gevur nýggjum foreldraumboðum kunning
- Tú lurtar eftir og hevur virðing fyri øðrum

## Nær er val?

Foreldraumboðini skulu veljast á fyrsta felags foreldrafundi. Sitandi foreldraumboð hava ábyrgd av at kunna um, hvat tað inniber at vera foreldraumboð.



## Skúlastýrið

Súsanna Bertholdsen, forkvinna tlf 294212

susanna.bertholdsen@skulin.fo

Gunnbjørg Guttesen, næstforkvinna tlf 258225

glguttesen@hotmail.com

Elin Jacobsen tlf 572802

372805@gmail.com

Dávið Jacobsen, læraraumboð tlf 255844

david.jacobsen@skulin.fo

Bjarni Hammer, umboð fyri kom. tlf 587538

bjarni@tvoroyri.fo

Hallur í Heiðunum, umboð fyri kom. tlf 220760

hallur@tvoroyri.fo

Finn Thomsen, skúlastjóri og skrivari, tlf 214955

finn.thomsen@skulin.fo



# Foreldraumboð í skúlanum



# Tvøroyrar- og Trongisvágs skúli



## Ein góð foreldranót

Betri foreldrini kenna hvønn annan, lættari gerst tað at loysa trupulleikar, sum kunnu stinga seg upp í skúlanum. Tá foreldrini hava tað gott saman, smittar tað á børnini.

Tey tosa penari við hvønn annan, og virða hvønn annan um tey vita, at foreldrini standa saman og taka trivnaðin í flokkinum í álvara. Góður felagsskapur millum foreldrini ger tað eisini lættari, tá reglur skulu gerast fyri "heimkomutíðir", lummapening, fartelefonir, veitslur o.s.fr.

## Foreldraráð

Foreldraumboðini i ymsu flokkunum skipa seg í eitt foreldraráð við einum samskipara. Ætlanin er at seta arbeiðsbólkar til at fara meira í dýpdina við viðkomandi evnum.

At fáa slíkt arbeiðið at koyra er sjálvandi ein tilgongd, sum er bæði lærurík og mennandi fyri bæði foreldur og skúlan.

## Bakland hjá skúlastýrinum

Sum foreldraumboð ert tú eisini millumlið millum foreldrini í flokkinum og skúlastýrið. Tú ert soleiðis við til at tryggja, at arbeiðið hjá skúlastýrinum er viðkomandi og málrættað. Ætlanin er, at fundir millum foreldraumboðini og skúlastýrið verða 2 ferðir um árið. Tú kanst eisini sjálv/sjálvur reisa mál, sum skulu viðgerast í skúlastýrinum.

---

*Fyrsta endamál við foreldraumboðunum er at tryggja samstarv millum hini foreldrini, lærarar og skúlastýrið.*

---

## Bakkur hjá lærarunum

Foreldraumboðini eru samstarvsfelagar hjá lærarunum. Lærarar og foreldraumboðini eiga at taka spurningar upp, sum viðvíkja flokkinum. Tað er serliga umráðandi at seta hol á møguligar trupulleikar, áðrenn hesir sleppa at veksa seg stórar.

Eisini tá lærarar skipa fyri tiltøkum av ymiskum slag ella gera útferðir ella túrar av onkrum slag, so eru foreldraumboðini sjálvandi fús at hjálpa til at skipa fyri og deila uppgávur út til øll foreldur í flokkinum.

## Hvat er eitt foreldraumboð?

Sum foreldraumboð ert tú bindilið millum flokkin, foreldrini, lærararnar og skúlastýrið. Foreldraumboðini hava ikki formelt vald, men um tú ert virkin í hesum arbeiði, so hevur tú í veruleikanum stóra ávirkan á gerandisdagin í skúlanum og sostatt eisini á gerandisdagin hjá tínum barni.

Sum foreldraumboð kanst tú t.d. spyrja:

- Er umhvørvið í skúlanum gott fyri innlæring?
- Eru hølini heilsugoð og hugnalig?
- Verður einstaka barnið virt av vaksnum og øðrum børnum?

Hugsa um, hvat tú kanst gera fyri, at tín skúli kann verða enn betur og hvussu tit sum foreldur kunnu samstarva um hesa uppgávu.

## Hvørjar eru uppgávurnar?

Tað eru ymiskar ítøkiligar uppgávur, sum tú kanst fara í holt við at skipa fyri sum foreldraumboð; bæði í samstarvi við onnur foreldur og/ella lærarar. T.d.:

- Vitjan á arbeiðsplássum hjá foreldrum
- Útferðir í náttúrina
- Útferðir til meginøkið. Vitja søvn, stovnar, svimja, bowla, biograf o.s.fr.
- Hugnakvøld saman við øllum foreldrum
- Floksveitslum

Sosial tiltøk eru við til at samansjóða børn, foreldur og lærarar frá fyrsta flokki av.